FYLGISKJAL 14

LM-065/2023

Sólgerð Hjørleifsdóttir

Fra: Puffin <puffin@olivant.fo>
Sendt: 12. december 2023 12:45
Til: Almanna- og mentamálaráðið
Emne: viðmerkingar til uppskot um broytingar í Kringvarpslógini

Hey tit,

eg eri uttanlands í løtuni, og hevði ikki møguleika at senda hetta fyrr enn nú freistin júst er farin.

Men her eru so mínar viðmerkingar, og møguliga vilja tit taka tær við kortini.

Bestu heilsur
Gunnar Skúvadal

Viðmerkingar til uppskot um broytingar í Kringvarpslógini

Samstundis sum tað er av alstórum týdningi fyri eitt nýmótans samfelag at hava ein vælvirkandi public service miðil, so er tað av líka stórum týdningi at hesin miðilin fær kompetent mótspæl og ikki í stóran mun er einsamallur um at definera streymin av viðgjørdum tíðindum. Av somu orsøk verða lisenspengar í grannalondunum eisini brúktir til aðrar miðlar, sum í størri ella minni mun samstundis eru komersiellir.

Gott hevði verið um politiska skipanin tók ábyrgd av samlaða føroyska miðlalandslagnum, og ikki bara royndi at sløkkja eldar, sum hetta uppskotið ber brá av.

Landsstýrið hevur sagt seg vilja hækka stuðulin til privatu miðlarnar. Higartil eru tvær ymiskar skipanir royndar, tá stuðulin skal býtast. Hvørgin teirra hevur eftir okkara tykki riggað, tí stuðulin í stóran mun ikki sæst aftur sum meira dygdargóður journalistikkur.

Vit hava áður skotið upp, at ætlaða upphæddin til at stuðla privatum miðlum verður brúkt til endamálið at stovnseta ein nýggjan public service líknandi miðil, har verandi privatu miðlar, kunnu gerast partur av hesum miðlinum, um teir ganga undir treytirnar.

Júst hvussu hetta skuldi verið gjørt, og harundir hvussu áðurnevndu treytir skuldu verið, hevði sjálvsagt kravt nógva fyrireiking og vilja til at hugsa "uttanfyri kassan". Men tað hevði loyst upp fyri teirri naggatódn, sum privatir, føroyskir miðlar tykjast vera í, við lítlari framdrift og einum forrætningsmodelli annars, sum ikki tykist at vera burðardygt og undir støðugari hóttan.

Tað hevði samstundis verið gott fyri brúkaran, sum fekk vissu fyri, at pengarnir ið verða lætnir í stuðli veruliga fara til at bøta um útboðið av tilfari, eins og fyri føroyskar journalistar, sum høvdu fingið fleiri og betri møguleikar fyri starvi. Hartil hevði tað eisini verið gott fyri KvF, sum fekk okkurt at samanbera seg við.

Eg eri vælvitandi um, at hesar viðmerkingarnar ikki snúgva seg so nógv um aktuella uppskotið um broytingar í KvF lógini. Men eg haldi kortini, at hetta uppskotið og ætlanirnar um privatan miðlastuðul hanga saman - ella í øllum førum áttu at gjørt tað.

Vinarliga
Gunnar Skúvadal